www.oljan.fo

Jan Müller 17 - 08 - 2012

Statoil stjóri vitjar løgmann - Boriúrslit um 4-6 vikur

Í dag eru tveir mánaðir síðani, at Statoil setti borin í aftur føroysku undirgrundina. Ovasti stjórin fyri altjóða leiting hjá Statoil, Tim Dodson hevur í sambandi við leiðslufund í Havn vitjað løgmann í Tinganesi, har hann greiddi honum frá, at alt gongur, sum tað skal við boringini, og at okkurt verður møguliga klárt at siga frá boringini um einar 4 til 6 vikur. Statoil úrmælingur vitjar Tað var ein brosandi og vælnøgdur Tim Dodson, sum oljan.fo fekk orð á úti í Tinganesi hósdagin, eftir at hann og onnur fólk í Statoil leiðsluni, herundir Rúni M. Hansen høvdu hitt Kaj Leo Johannessen, løgmann. Hetta er hansara fyrsta vitjan í Føroyum nakrantíð. Og vit spurdu, hvussu tað kendist at vitja oyggjarnar úti í Atlantshavi, sum hansara forfedrar 1000 ár frammanundan komu fram á! Tað er sera gott at vera her, og tú kennir teg sera vælkomnan til Føroya. Eg má siga, at eg eri eitt sindur kløkkur og ikki minst hugtikin av at síggja, hvussu væl tit hava skipað tykkum sum samfelag. Og tað var eisini sera gott at hitta tykkara løgmann. Fundurin var góður og konstruktivur. Vit bíða báðir spentir eftir úrslitinum av Brugdan brunninum, og vónandi kunnu vit venda aftur um ikki so langa tíð við sera jaligum tíðindum. Boriúrslit um 4-6 vikur -Heldur tú tá, at vit sum samfelag eru før fyri at taka ímóti hesi stóru avbjóðingini, sum ein oljuvinna kann gerast? Eg eri sannførdur um, at tit fara at megna hesa uppgávuna og haldi eisini, at tykkara ríka sjóvinnusøga er eitt stórt virði í sær sjálvum og her ikki minst tykkara pragmatiski hugburður. Tann sera opni dialogurin eg havi havt við tykkara myndugleikar er eisini eitt gott prógv um, at tit kunnu klára hesa avbjóðing. Tim Dodson skundar sær at viðmerkja, at teir í løtuni bora Brugduna á landgrunninum. Um alt gongur sum ætlað hava vit kanska okkurt at siga tykkum um 4 til 6 vikur. Ársins leitistjóri Tim Dodson hevur átt nógvar av yvirskriftunum í norskum og atljóða bløðum hetta seinasta árið og ikki

uttan orsøk. Hann er nevniliga útróptur til at vera tann besti leitistjórin í heiminum í ár. Hann hevur staðið á odda fyri nýggju leitistrategiini hjá Statoil, sum er at bora eftir olju og gass í ókendum og váðafullum økjum kring heimin men samtíðis við møguleika fyri at gera stór fund. Og eitt fyri og annað eftir hevur Statoil undir Tim Dodson leiðslu gjørt stór olju- og gassfund í Barentshavinum, Norðsjónum, Brasil og í Eysturafrika. Nú skulu so Føroyar standa sína roynd. Og Tim Dodson er spentur men eisini varisliga bjartskygdur, tá oljan.fo spyr, um hansara success eisini fer at halda fram í Føroyum? Tað vóna vit. Hetta er tann áttandi brunnurin her, og Føroyar eru framvegis eitt øki við stórum váða, men tey feløg, sum ikki fara eftir økjum við stórum váða og við møguleika fyri at gera stór fund, tey finna heldur ikki tær stóru olju- og gasskeldurnar. Gott at hava ExxonMobil við Tim Dodson fegnast annars um, at stóra amerikanska oljufelagið ExxonMobil tók avgerð um at gerast partur av leitingini í Føroyum saman við Statoil. Tað er sera hugaligt, at ExxonMobil er við í hesi verkætlanini - at tað eru feløg við stórari vitan og royndum, sum vilja vera við til at átaka sær ein váða saman við okkum og harvið eisini kunna fáa ágóðan av einum møguligum stórum fundi. Tim Dodson leggur aftrat, at ExxonMobil er ein sera góður samstarvspartnari. Tað hevur verið sera virkið í hesi stóru verkætlan líka frá tí, at tað gjørdist partur av leitingini við Føroyar. Varisliga bjartskygdir -Hvussu stórur er møguleikin fyri at gera eitt Brugdufund? Møguleikin fyri at gera fund í slíkum leitingarmiði (stað, har útlit er at finna olju), er ein út av fimm ella ein út av seks ella sjey. Sjálvandi kann man eisini siga, at møguleikin fyri at bora turt er 8 ella 9 av 10 møguleikum. Men um vit ikki hildu, at møguleiki er fyri at finna olju ella gass, so vóru vit ikki her. So vit eru varisliga bjartskygnir. Vit spurdu Tim Dodson, sum er partur av samtaksleiðsluni í tí eftir europeiskum viðurskiftum risastóra Statoil, hvussu tað er at arbeiða saman við einum føroyingi sum Rúna M. Hansen. Rúni ger eitt sera gott arbeiði fyri okkum í Føroyum. Tað hevur stóran týdning fyri okkum at hava ein lokalan persón við í hesum týðandi arbeiðinum. Og so eri eg eisini sera fegin um at hava hann á mínum liði í sambandi við altjóða leiting, har hann er valdur út til at standa á odda fyri Arktisku deildini hjá Statoil. Umframt Tim Dodson vitjaðu eisini Nick Maden Senior Vice President, Exploration International og Carlon Gil, Senior Geologist her. Lesið eisini seinna partin av samrøðu við Tim Dodson um virksemi í Føroyum eftir møguligt fund og myndafrásøgn frá vitjanini - oljan.fo - leygardagin Myndir - Tim Dodson, stjóri fyri altjóða leiting hjá Statoil saman við Kaj Leo Johannessen, løgmanni í Tinganesi Statoil fólk í Tinganesi Myndatøka oljan.fo/Jan Müller